

# Pedagogar og hjálparfólk

**Frískúlin í Havn søkir ein pedagog (38 tímar/vikuna) og eitt hjálparfólk (19 tímar/vikuna) til skúlaárið 2010-2011.**

**Hevur tú hug at arbeiða**
- á einum spennandi og mennandi arbeiðsplássi
- saman við engageraðum starvsfeløgum
- við forvitnum, lívsglaðum og engageraðum børnum og foreldrum teirra
- í einum eftirmetandi umhvørvi, sum altíð roynir at gera tað betur
- á einum arbeiðsplássi í vøkrum náttúruumhvørvi, so hevur tú møguleika at søkja NÚ!

**Arbeiðsuppgávurnar eru, m.a.**
- at hava ábyrgd av skúlakøkinum, harundir vørubílegging og matgerð
- at taka smærri næmingabólkar ella einstakar næmingar við í matgerðina
- at vera við til at skipa fyri uttanduraspølum og -virkni
- at verða ein partur av frítíðaransingar-skipanini.

**Vit vænta at**
- tú ert fakliga dugnalig/ur, eftirmetandi og reflekterandi
- tú dugir at arbeiða bæði í toymi og sjálvstøðugt
- tú sær møguleikar heldur enn forðingar
- tú hevur námsfrøðiligar áskoðarnir, sum samsvara okkara námsfrøðiliga grundvølli.

Frískúlin í Havn samantvinnar skúlatíð og frí-tíðaransingartíð. Sí okkara heimasíðu www.friskulin.org. Eyka frítíðaransing er frá kl. 15 hvønn dag. Á Frískúlanum eta vit mat úr skúlakøkinum á middegi (breyð, viðskeri og ymiskt grønmeti/salat), og seinnapartin fáa vit millummála. Vit leggja dent á heilsugóðan mat, sum vit meta er grundleggjandi fyri trivnað og innlæring. Vit leggja eisini dent á at røra okkum, at fara út/spæla úti í náttúruni hvønn dag og at næmingarnir taka lut í tí praktiska arbeiðinum í skúlanum.

Løn sambært galdandi sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

Vilt tú vita meira um Frískúlan í Havn og størvini, ert tú vælkomin at seta teg í samband við skúlaleiðsluna, Sharon Weiss/Eyðbjørg Dalsgaard á tlf 22 81 50 (Frískúlin) ella info@friskulin.org.

Umsóknir skulu sendast til Frískúlan í Havn, Undir Borgarhálsi 44, 176 Velbastaður.

Umsóknarfreistin er 26/7-2010.

**Frískúlin í Havn**
Undir Borgarhálsi 44
176 Velbastaður
tlf. 32 81 50





# Listaframsýning á ólavsøku

Lions Club Tórshavn skipar aftur í ár fyri listaframsýning í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku.

Opið verður 28. juli til 1. august.

Hevur tú hug at taka lut í hesi framsýning, set teg í samband við Lions Club Tórshavn á telefon 734001, 216561, 210599 ella 213800 áðrenn 9. juli.

Málningar, ið skulu sýnast fram, skulu handast nevndini tann 23. juli kl. 18 – 20 í Müllers Pakkhúsi.

Óseldir málningar skulu avheintast aftur sunnudagin tann 1. august millum kl.18 og 20.

Vinningurin av málningasøluni fer til vælgerandi endamál.

**LIONS CLUB TÓRSHAVN**

# TIL SØLU

**Ein partur av hárfríðkanarstovuni Shair, Niels Finsensgøta 36, Tórshavn, er til sølu, um hóskandi boð fæst.**

**Áhuga kunnu ringja á tlf. 516900**

Shair SALONG
N. Finsensgøta 36 | Tel 316900

STILLADS LEIGA
Absolutt bíligast!



GUTTORM MORTENSEN
www.stilladsleiga.com
TELEFON 25 11 60

www.fjorukrogvin.fo
- Matstova
- Søgusavn
- Gávubúð

FJØRUKRÓGVIN
Restaurant ~ Bar
Tel. 471500 / 771500

VÓNIN®



# Skrivstovunæmingur til P/F Vónina í Fuglafirði

Søkt verður eftir skrivstovunæmingi til P/F Vónina í Fuglafirði at byrja hálvan september 2010 ella eftir avtalu.

Vit vænta, at tú hevur HH-prógv, er ábyrgdarfull/ur og røkin, er fyrikomandi og dugir at orða teg í skrift og talu á føroyskum, enskum og norðurlendskum.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi og mennandi lærupláss í einum umhvørvi, har tað snýr seg um at veita eina góða tænastu.

Umsókn, saman við møguligum prógvum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. juli 2010. Umsóknin kann sendast við posti ella við telduposti til: eo@vonin.com.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, er tú vælkomin at seta teg í samband við Eyðfinn Olsen á tlf. 213883.

**P/F VÓNIN**
Bakkavegur 22 | Postboks 19 | FO-530 Fuglafjørður

**KVINNUHÚSIÐ**
Postmoga 278 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 317200 · Fax: 313243
post@kvinnuhusid.fo
www.kvinnuhusid.fo

# Námsfrøðingur til Kvinnuhúsið

Søkt verður eftir námsfrøðingi 30 tímar um vikuna at byrja 16. august 2010 ella eftir nærri avtalu. Umsøknin skal sendast til Kvinnuhúsið, Postrúm 278, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 19. juli 2010.

Fremsta uppgávan er, at vera um børnini ið gista á Kreppumiðstøðini. Tann, ið verður settur skal somuleiðis, í samstarvi við dagliga leiðaran, taka á seg allar uppgávur, sum arbeiði í Kvinnuhúsinum ber í sær. Arbeiðsuppgávurnar eru spennandi og fjølbroyttar við nógvum avbjóðingum. Arbeiðstíðin er gerandisdagar millum kl. 8 og 17.

Umsøkjarin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava hug og hegni at samstarva og samskifta við onnur.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Kvinnuhúsið.

Lesið Sosialin -so eru tit við!